# Tá ið samhaldsfesti verður misbrúkt

JÓNLEIF JOHANNESEN
Klaksvík

Jørgen Niclasen sigur við Sosialin 10 juli, at samhaldsfasta ketan hjá fakfeløgunum er gloppin av. Formaður folkaflokksins lastar fakfeløgini fyri, at tey ikki vilja ganga við til sáttmálabrot og lønarsteðg. Avgerðin hjá fakfeløgunum hevði kanska verið ørvísi, um søgan um samfelagssinni var bjartari.

**Søgan um samfelagssinni**
6. oktober í 1992 fóru Føroyar á húsagang. Fakfeløgini vístu samfelagssinni. Eftir drúgvar samráðingar gingu fakfeløgini í februar 1993 við til ein lønarniðurskurð uppá 8,5 %. Lønarniðurskurðurin skuldi vara frá 1. februar 1993 og árið út.

Tá 1994 nærkaðist fingu fakfeløgini stingin. Løgtingið gjørdi semjuna til lóg. Lønarniðurskurðurin skuldi halda fram frá 01.01.1994 til 01.01.1995.

Í 1995 varð knívurin snaraður. Fakfeløgini skuldu berjast fyri at fáa lønina uppá 0 aftur. Ikki fyrrenn í 1998 fekk eitt nú Føroya Lærarafelag eftir tógvi stríð sama lønarstøði aftur.

Hetta er í stuttum syrgiliga søgan, um tá tey almentløntu og teirra fakfeløg vístu samfelagssinni.

**Møguleikin, ið fór**
Tann fyrsta oktober í 2008 høvdu politikararnir møguleikan at styrkja álitið aftur millum partarnar. Tey alment løntu høvdu 1.oktober í 2008 eitt reallønarfall áleið 5 %. Men ístaðin fyri at rætta henda skeivleikan, var einki gjørt.

**Fakfeløgini onga ábyrd**
Fakfeløgini byggja sína støðutakan á ein vælgrundaðan syndarligan søguligan veruleika. Tað var politiski mynduleikin, sum niðurbreyt álitið og tískil eisini hann, sum eigur at byggja uppaftur. Fakfeløgini kunnu ikki handla stórt ørvísi í verandi støðu.

# So reyk høvdið av Hans Paula Strøm

EYÐUN MOHR VIDERØ



Hans Pauli er klagaður til Landsstýrismálanevndina fyri ov høga peninganýtslu í mun til játtan á fíggjarløgtingslóg ella aðrari játtanarlóg, soleiðis sum yvirskipað lóg krevur.

Ongin er í iva um, at Hans Pauli hevur játta hægri nýtslu til tørvin á almanna- og heilsuøkinum, og ikki til sín sjálvs.

Nú síggjast í fjølmiðlunum uppgerðir yvir, hvussu nógv onnur landsstýrisfólk hava nýtt meiri enn játtað, men bert Hans Pauli verður "drigin í rættin"

Vit vita, at almannaøkið er rættuliga torført at fíggja neyvt. Nógv tær flestu útreiðslurnar eru lógarfestar, og tað ber illa til at steðga lógarfestum útreiðslum, um játtanin ikki røkkur.

Men! Hvussu neyvt eftirlit er við dagligu útreiðslunum, sum fara út av almannastovuni til ditt og datt, men kortini ikki lógarbundnar?

Eg havi nevnt tað í øðrum greinum: Hvussu ber tað til, at hesi so væl skúlaðu fólkini, ið verða sett í starv í almennu fyrisitingini sambært starvslýsingum: Hví eru fíggjarligu viðurskiftini ikki lýst fyri avvarandi myndugleika so hvørt, sum tað sæst, at játtanin ikki røkkur. Sum skilst, so fær Løgtingið einki at vita, fyrr enn roknskapurin kemur á borðið langt aftaná, at roknskaparárið er lokið!

Hví verða umbønir um eykajáttanir ikki umbidnar so hvørt, fíggjarjáttanin ikki røkkur?

Ella er nakar ræddur fyri, at neyvari eftirkanning av útgjaldingunum kundu gjørst keðiligar fyri onkran?

Tað vildi verið løgið, um Løgtingið noktaði at geva eykajáttan, um tað vóru tær lógarfestu útreiðslurnar, ið ikki nokk av játtan vóru fyri.

Málið er nevvan so einfalt, sum bert at ein landsstýrismaður má frá, ella verður sitandi!

# Bussleiðin skal spara – ein skandala

LEVI MØRK
býráðslimur í Havn



Fríggjadagin samtykti tekniska nevnd at fremja sparingar innan bussleiðina. Samtykt var at eingin bussur koyrir sunnudag og einging bussur koyrir eftir kl. 14. leygardag. Samstundis gevast skúlaleið 1,2, og 6 at koyra frá 1. august 2009. Samtykt var at tveir túrar skulu sparast burtur á rutini til Velbastað/Kirkjubø.

Samtyktin er endalig.

Eg stemmaði ímóti, tí hesar sparingar serliga raka skúlaleiðirnar og raka hart hjá nógvum ungum og børnum. Hetta ferð eisini at føra við sær økta ferðslu, ótryggleika hjá børnum og ungum. Samstundis koma fleirio børn og ung ov seint í skúla um tey skulu taka aðrar bussleiðir. Samstundis stressar hetta barnafamiljur meira, har tey verða noydd at fara fyrr upp um morgunum fyri at noða, at fáa børnini í skúla, um tey skulu taka bussin. Eisini ferð hetta serliga at raka útjaðaran í Havn t.e Hoyvík, Norðasta Horn, Kirkjubøður, Velbastað og Kollafjørður.

Eisini meti eg at tað kundi verið onnur økir inna bussleiðina í ein kann spara t.e um kvøldi og har ein møguliga kundi sett gjald á. Men, at fara eftir børnum og ungum eri eg ímóti. At tað er spart leygardagar og sunnudagar er í lagið, tí kanningar hjá Lóður, vísa at bussarnir koyra næstan tómur hesar dagar, men her kundi verið bussgjald.

Góða summarfrítíð.

# VÍK, TELT og MÁL(FR)ØÐI

EYÐUN Á BORG



Hvør fer skeivur,Arni?

Tú skrivar: -- undarligur tvídráttur, serstakliga um kvennkynsorðið, vík, og síðani: --báðir partar fara skeivir!

Nú skrivar tú næstan sum ein argur skúlalærari.

Nei, tú, hvørgin partur fer skeivur!!

"Hin" parturin hevur loyvi til at siga Teltavíks-, eg meini Tjaldavíkshólmur, tí málsliga siðvenjan hevur góðtikið tað, sjálvt um tað ikki er rætt eftir mállærureglunum. Hatta essið er annars at finna bæði í orðabók og atlasi, sum tey flestu helst munnu vita.

HÚSAVÍKARBRØV og HOYVÍKSHÓLMUR:

Lat ongan iva vera um, at ein hálvgamal føroysklærari við ættarbondum úr Húsavík og Hoyvík kennir Húsavíkarbrøvini og sjálvandi eisini úttaluna av Hoyvíkshólmi og Hoyvíksfles!!

SÁLARBÓTARÁ og UNDIRGRUNDAR-AVTALA:

Eg og mínir líkar hava sjálvandi eisini loyvi til at siga / skriva húsavíkarbrøv, víkarbyrgisfólk (trý navnorð í einum), undirgrundaravtala og Sálarbótará, sum eru vakrari og rættari sambært mállærureglum!!

Sunnan fyri Argir hava vit Sálarbótará. Soleiðis hevur hon altíð itið!

Ein kendur málfrøðingur bað einaferð fjølmiðlafólk siga / skriva : undirgrundaravtala, ikki –grunds!

Annars havi eg ikki skrivað eitt orð um, at "hin" parturin ikki kann siga Tjaldavíkshólmur, sum onkur kanska hevur fingið fatan av.

TELT:

Telt var annars orðið, eg skrivaði um, ikki vík! Royndi at fáa fólk / fjølmiðlar at brúka tað vakra, føroyska orðið, TJALD!

E.S.: Takk fyri málstuðulin, Kai!

E.E.S.:
Oyggjaleikafólkini (ikki leiks)! Hjartaliga til lukku við stóra bragdinum!

AB-kvinnur/gentur! Hjartaliga til lukku við steypinum!

Reyði drekin! Hjartaliga til lukku við føroyameistaraheitinum!

Við málfrøi.

# Beinleiðis róðrarmyndir ein perla í Kringvarpinum

VAGNUR MICHELSEN



Fyrsta ítróttagreinin, eg sum smádrongur fekk alsk fyri, var kapproður. Búði við Landavegin, men hugurin dró tíðliga oman á eystaru bryggju at hyggja at bátum og skipum, og tá ið eitt systkinabarn fór at stýra 8-mannafarinum Ørvi, vaks róðrarhugurin enn meiri. Trettan ára gamal slapp eg at stýra Sílinum og seinni Ørvi, og sjálvt um hondbólturin knappliga dró meg í Gundadal, og tú varð meira enn bitin av hesum spæli, so var kapproðurin altíð í hugaheiminum í summarmánaðunum.

Vit gleddu okkum til hvørja ólavsøku, tá ið kapproðrarbátar úr hvørjum heraðshorni í Føroyum komu til Havnar at rógva á ólavsøku. Hæddarpunktið hjá okkum ungu var at leita oman á Kongabrúnna at hyggja at kapproðrarbátunum, sum allir stóðu har til framsýningar ólavsøkudagarnar. Bara at sleppa at nema við 10-mannafarið Sumbingin ella ein av hinum kendu bátunum bjargaði mest sum ólavsøkuni.

Útvarp Føroya við Niels Juul Arge útvarpsmanni á odda setti serligan dám á kapproðurin við frálíkum frásagnum. Niels Juul var eitt skifti formaður í Havnar róðrarfelag og skrivaði bókina Drekan. Miðskeiðis í 70-árunum tók Jógvan Arge við eftir pápan, og hevur hann í ein mansaldur sett sín dám á kapproðurin við meistarligum frásagnum. Nú er alt hetta róðrarsøga, tí Jógvan Arge starvast ikki longur í Sortudíki. Eingin ivi um, at Útvarp Føroya í meira enn fjøruti ár var við at menna kapproðurin kring landið.

**Beinleiðis sjónvarpsmyndir**
Tað tøkniliga í samfelagnum mennist við fúkandi ferð, og hetta er eisini komið føroyskum kapproðri til góðar. Í 2004 syrgdi toftamaðurin Gunnar Hansen fyri, at róðrarúrslitini nakrar minuttir eftir hvønn róður sóust á heimasíðuni Drekanum. Seinni vórðu hesi úrslit eisini send hinum fjølmiðlunum. Ja, hann snikkaði eisini saman sms-skipan, har úrslitini komu á fartelefonina, sekundir eftir úrslitini vóru skrivað á telduna í málbilinum.

Men tað tøkniliga steðgaði ikki her. Kringvarp Føroya hevur í 3-2 sendingunum framleitt frálíkt kapproðrartilfar við myndum og frásagnum. Í ár er so tað meistarliga frambrotið framt, at tú kanst síggja allar FM-róðrarnar beinleiðis á teldusk ígganum, hvar í heiminum tú ert. Havi sæð allar seks FM-róðrar í ár á henda hátt, og eg má siga, at tað er ótrúligt, at hetta kann lata seg gera.

Eg havi serligan áhuga í tí taktiska í kapproðrinum, og nú hevur tú róðrarnar beint framman fyri tær á stórum telduskíggja og kanst eygleiða og gera niðurstøður, sum tær lystir. Hetta droymdi tú um fyri fleiri árum síðani.

Róðrarfrásagnirnar eru framvegis góðar, tó annar stílur, enn tá ið Niels Juul og Jógvan Arge ráddu fyri borgum. Suni Merkistein og Solby Eliasen klára seg væl, og funnin frensur er viðmerkjarin Ludvík við Stein, sum í nógv ár róði við Eysturoyingi. Eisini riggar væl, at viðmerkingar koma frá rógvarum, sum júst eru komnir í dráttin eftir vunnan róður.

Øll frásøgufólkini vita nógv um føroyskan kapproður, tó kundi tú ynskt tær, at tey settu seg enn meira inn í føroyskan kapproður. Her hugsi eg um nýggjar bátar, manningar og feløg, sum er frálíkt tilfar at taka til millum róðrarnar.

Hjartasuffið í hesi grein er barnaróðurin. Í fyrraárið var sagt, at føroyskur kapproður var í kreppu, tí bátatalið minkaði. Í 2009 kunnu vit staðfesta sólskinsøguna, at heili 33 barnamanningar hava róð í summar, sum næstan er helvtina av róðrarflotanum.

Feløg hava skilt, at skulu tey manna bátar í framtíðini, so má byrjast við barnaróðri. Vit skulu øll lofta hesari menning og vísa barnaróðrinum serligan áhuga. Í 2010 vísir Kringvarp Føroya sjálvandi eisini beinleiðis sjónvarpsmyndir frá barnaróðrinum. Ella kunnu barnaróðrarnir bandast og sendast í steðginum millum FM-róðrarnar, tí tað tekur bara millum tveir og tríggjar minuttir at avgreiða ein barnaróður.